


## Føroyskur sandbátur í samastoyti í Noreg

Tað mundi endað heilt galið undir Sotrabrúnni við Bergen í nátt, tá føroyski sandbáturin Havsund um tvey tíðina nam við norska fraktskipið Astrea. Skipini sigldu til Bergens, har norskir sjófartsmyndugeikar kannaðu tey fyrrapartin. At síggja til hava bæði skipini hava fingið skaða, tó at talan bara er um smávegis snuddir. Men skaðin kundi verið nógv størri, tí skipini høvdu kós beint ímóti hvør øðrum undir brúnni. Sjófartsmyndugleikarnir siga við Bergens Tidende, at tað er ov tíðliga at gera nakrar viðmerkingar til hendingina enn, men at annað skipið má hava skulað hildið av fyri hinum. Eingin mannsskaði stóðst av hendingini, og hvørki Havsund ella Astrea leka, er staðfest.

## Smyril ger rundferð á Hvítusunnu

Hvítusunnudag 31. mai 2009 er ætlanin at skipa fyri enn einum túri runt Føroyar við Smyrli. Hesin túrur hevur verið royndur í nøkur ár, og hevur áhugin verið rættiliga stórur, verður sagt av Strandferðsluni. Eftirmetingar av seinasta túrinum hava somuleiðis verið góðar, og tí ynskir Strandfaraskip Landsins at royna hetta tiltak aftur í ár. Í ár verður skipað fyri ymiskum undirhaldi fyri vaksnum og børnum. Eisini verður frásøgumaður við á ferðini. - Øll eru vælkomin við á rundferðina, sigur Strandferðslan.

# Ber ella brestur í Klaksvík



*Síðan fjør heyst hava gólvini á fiskavirkinum á Kósini verið turr og virkið, sum fór gjaldssteðg seint í 2008, hevur at kalla einki virksemi havt at bjóða teimum, sum hava havt sína inntøku har*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tað er tann brennandi spurningurin, sum eingin við vissu veit nakað at siga um enn. Skiftirætturin hevur longt gjaldssteðgin, sum felagið, ið eigur fiskavirkið Kósina í Klaksvík, fór í seint í 2009**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Heilt síðan við endan av seinasta ári, tá felagið, sum eigur fiskavirkið á Kósini, fór í gjaldssteðg, hevur Jóhan Páll Joensen, stjóri í Maru Seafood, sagt, at arbeitt verður við eini loysn at endurskipa stóra og týdningarmikla arbeiðsplássið í Klaksvík.

Stjórin hevur lagt dent á, at tað ikki er avgerandi, hvør endurreisarin verður, men í fyrst og fremst, at hetta verður gjørt, so fólk aftur kunnu sleppa til arbeiðis á Kósini.

- Vinna vit ikki á mál, mugu onnur taka um endan, hevur hann sagt í samrøðu við Sosialin.

### Gjaldssteðgur longdur

Tó at tíðin er drigin út, og at almenningurin ikki er kunnugur við nakra ítøkiliga endurreisingarætlan, góðtók Skiftirætturin í gjár at leingja gjaldssteðgin í tríggjar mánaðir aftrat.

Hetta var eftir áheitan frá Christiani Andreassen, advokati, sum hevur eftirlitið um hendi.

At gjaldssteðgurin er longur, merkir so eisini, at vónin um at endurreisa fiskavirkið á Kósini ikki er slept.

Í samrøðu við sjónvarpið hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið, var advokaturin varin og tordi ikki at geva sítt boð uppá, um tað fer at eydnast at fáa íleggjarar til endurreisn av virkseminum.

Kortini segði hann seg vænta, at ein avklároing um hesi viðurskifti fer at fyriliggja um stutta tíð – og helst í góðari tíð áðrenn hesir tríggir mánaðirnir eru umlidnir.

### Stórt tap

Stjórin í Maru Seafood hevur í hesi vikuni sagt í fjølmiðlunum, at tað hevur gingið striltið at fáa nýggjar íleggjarar at seta pening í virksemið.

Sum ein av møguligum íleggjarunum hevur Føroyagrunnurin verið uppá tal, men tá Kósin fór í gjaldssteðg, skiltist, at grunnurin ikki var serliga áhugaður í at gera íløgur í fiskavirkisvinnuna í løtuni.

Líkt er tó til, at grunnurin ikki er so avgjørdur longur um ikki at verða við í eini møguligari endurreisn av Kósini.

Tað var danska stjórnin, sum í sínari tíð stovnaði Føroyagrunnin fyri at bjarga størfyritøkuni J.F. Kjølbro.

Jóhan Páll Joensen ásannaði í fjølmiðlunum í vikuni, at ein stórur partur av tíðini, síðan felagið fór í gjaldssteðg, er farin til at greiða viðurskiftini millum Føroya Banka og Norðoya Sparikassa. Hetta endaði við, at peningastovnurin í Klaksvík tók seg heilt burtur úr Kósini, samstundis sum hann staðfesti sítt størsta tap nakrantíð, 15 miljónir krónur.

Hin stóri kreditorurin er Føroya Banki.

### Glottar at hóma

Í fjør heyst kravdi Føroya Banki teir seks partrolararnar, sum vóru undir hattinum hjá Maru Seafood, seldar á tvingsilssølu.

Tvey av skipunum endaðu í Suðuroy, Navarin og Borgarin, meðan tey fýra, ið eftir vóru, Nónhamar, Fjalshamar, Safir og Smaragd, seinni eru keyptir aftur til Klaksvíkar.

Hetta gevur vónir um, at ráfiskagrundarlagið undir Kósini kann tryggjast, tí umframt ísfiskatrolararnar eigur Klaksvíkin nógv línuskip og nógvar útróðrarbátar.

Eingin selir sína veiði aðrastaðni enn, har mest fæst fyri fiskin, men nú vit hava Fiskamarknað Føroya, er hesin eitt gott barometur fyri, hvar prísstøðið á ymisku fiskasløgunum liggur.

Kósin er eitt av teimum størstu fiskavirkjunum í landinum, og seinnu árini hava ráfiskanøgdirnar, sum virkið hevur keypt og virkað, ligið millum eini 10.000 og 11.000 tons.

# Tvey línuskip hava landað í Klaksvík

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landararnir hjá Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík hava ikki havt nógv at gera seinastu dagarnar. – Skipini eru færri, og hugurin at rógva út hevur ikki verið góður, nú fiskaprísirnir hava verið so lágir, sigur landingarformaðurin.

Mánadagin landaði línuskipið Grani í Klaksvík. Teir høvdu sløk 50.000 pund. Í dag er Fugltúgvan inni, og teir hava stívliga 73.000 pund.

Aftrat hesum hevur útróðrarbáturin Líðhamar verið úti síðstu nátt. Teir høvdu eina góða seta og fingu millum 9.000 og 10.000 pund, meginparturin toskur.

Á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík sigur landingarformaðurin, Pól Fuglø, at lítið hevur verið at gjørt hjá seinastu tíðina.

– Skipini eru færri, og hugurin at rógva út hevur ikki verið góður, nú fiskaprísirnir hava verið so lágir, sigur hann.

Pól Fuglø vísir á, at viðhvørt er líkt til, at prísirnir hava hug at kvinka sær uppeftir aftur – men síðan fella teir nakað aftur.

- Eg haldi, at Líðhamar mundi selja fyri einar 10 krónur í miðal fyri kilo, leggur hann aftrat.

Pól sigur, at landingarvirksemi sum heild hevur verið lítið í ár, og tað merkist týðiliga, at seks partrolarar ikki hava verið partur av fiskiskipaflotanum í Klaksvík í hesum tíðarskeiði.

Hann vísir á, at skipini, sum P/F Christian í Grótinum keypti frá Føroya Banka, Nónhamar, Fjalshamar, Safir og Smaragd, liggja í Klaksvík, har ymiskt verður gjørt við tey.

- Men enn hava tey ikki loyst, sigur landingarformaðurin, sum annars fegn ast um, at tað eydnaðist klaksvíkingum at keypa hesi skipini aftur til bygdar.



*Tað er deydligt við Kósabrúnna í Klaksvík um dagarnar, men í dag landar línuskipið Fugltúgvan*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*